# ES



*Íslendingar skulu á altingsval nú leygardagin*

sum heild er øðrumegin ein dygg almenn vælferðar-, almannatrygdar- og útbúgvingarskipan og hinvegin eitt vinnulív grundað á handilsfrælsi, opnan marknað og virkna luttøku í altjóða samstarvi.

### Valmanifest

Sum lið í valstríði sínum hevur Samfylkingin sent út ein bókling við heitinum Javnvág og framburður/Búskaparpolitikkur við ábyrgd (Jafnvægi og framfarir/Ábyrg efnahagsstefna). Bóklingurin, sum Jón Sigurðsson hagfrøðingur og fyrrverandi stjóri í Norðurlendska fíggingarbankanum, Tjóðbankastjóri og fíggjarmálaráðharri, hevur ritstýrt, er ólíkur øðrum valsstríðsritum, er meiri sum ein greinagerð og kann saktans lesast sum eitt slag av manifesti, har politisku framtíðaráherðslurnar hjá flokkinum eru annar tráðurin.

Í bóklinginum verður búskaparstøðan í Íslandi lýst frá einum atfinningarsomum sjónarmiði. Atfinningarnar eru serliga vendar móti teirri búskaparstýring, sum stjórnarsamgongan hevur staðið fyri tey seinastu seks árini. Undirlagið fyri atfinningunum er útígjøgn, at ES-limaskapur er tað hald sum Ísland eigur at seta sær til at tryggja búskaparligan støðugleika og vælferð.

Sambært bóklinginum hevur sitandi stjórn ikki megnað at samskipa politikk sín í sambandi við fíggjarviðurskiftini hjá tí almenna og peningamál yvirhøvur. Úrslitið er, at óstøðuleiki valdar í búskapinum við øktari virðisminking (inflation) og versnandi vakstrarlíkindum. Í mars 2001 valdi stjórnin at áseta mark fyri virðisminkingina (inflatiónina) og setti gangvirðið (kursin) á krónuni á flot. Kortini hevur stjórnini ongantíð eydnast at fáa bilbugt við virðisminkingini, siga bóklingshøvundarnir, tvørturímóti hava royndirnar at tálma virðisminkingina við at hækka grundrentuna hjá Tjóðbankanum gjørt sítt til at halda gangvirðið á krónuni høgum, sum so aftur hevur elvt til hall á handilsjavnanum.

Tey seinnu árini hevur ein innstoytur verið av útlendskari fígging í íslendska kervið bæði orsakað av íløgum í stórverkætlanir (eitt nú Kárahnjúkabyrgingina), men eisini til endurláns innanlands. Hesin innstoyturin hevur eisini trýst gangvirði á krónuni upp.

Onnur viðurskifti, eitt nú at útlendskir lánistovnar geva skuldabrøv út í íslendskum krónum, hava virkað sama veg.

Undir slíkum umstøðum er gangvirði hjá krónuni sum minsta gjaldoyra á altjóðamarknaðinum ridlut og viðbrekið fyri skiftingum á fíggjarmarknaðum úti í heimi. Í tíðarskeiðinum frá 2001 til 2006 hevur veruliga gangvirðið á krónuni sveiggjað nógv og var í seinasta ársfjórðingi í 2005 heili 42 prosent hægri enn í sama ársfjórðingi í 2001.

Viðskiftakostnaðurin hjá íslendskum fyritøkum er nógv vaksin orsakað av hesum og sveiggini í gangvirðinum minka um íløguhugin hjá teimum.

Hóast bóklingshøvundarnir ásanna at verðandi gangvirðiskipan (t.e. at krónan flýtur) kann fáast at virka um onnur búskaparlig stýriamboð verða brúkt við skili, er niðurstøðan hjá teimum tó, at áneyðir eru at umhugsa at skipa gjaldmiðil og gangvirði øðrvísi í Ísland, tí spurningurin er, sum teir taka til, um krónan er nóg stór fyri Ísland.

Við øðrum orðum eiga íslendingar gera búskap sín út til at uppfylla tey krøv og treytir, sum settar verða fyri at kunna taka evruna upp sum løggildan gjaldmiðil.

### Landbúnaður og studningstryggjaðir okursprísir

Í bóklinginum fær íslendski landbúnaðurin toyggi. Soleiðis sum landbúnaðurin nú er skipaður, skriva bóklingshøvundarnir, ger vantandi kapping, almennur framleiðslustudningur, miðstýring av framleiðslu og príslagi, høgur tollur á innflutta búnaðarvøru og innflutningsforðingar, at matvøruprísurin í Íslandi er uppi í gjøgn.

Landbúnaðurin verður rikin eftir einum avoldaðum heildarlagi, ið tað almenna hevur tikið undir sín verndarvong. Skipanin er ein tíðarvilla og eigur tí at verða broytt sum skjótast.

Sitandi stjórn hevur havt eitt søguligt høvi, halda høvundarnir, miðvíst at umskipað framleiðsluog søluviðurskiftini innan landbúnaðin. Undanfarin ár hevur áhaldandi trot verið á arbeiðsmegi í mongum vinnugreinum. Slíkar umstøður áttu at gjørt tillaging til nýggjar virkishættir munandi léttari enn annars. Men stjórnin læt henda møguleika gleppa sær av hondum.

Við teimum royndum í huga sum íslendingar hava havt av at fríhandli og upplating av marknaðum, eitt nú síðani ESB-sáttmálin kom í gildi, meta høvundarnir, at ES-limaskapur er greiðasta leiðin hjá íslendingum bróta seg út úr hesi stirðnaðu landbúnaðarskipan, sum fyrst og fremst verður rikin til frama fyri fastgrógvin seráhugamál í samfelagnum.

Teir ásanna, at landbúnaðarpolitikkurin hjá ES ikki er lýtaleysur sæddur í heimsbúskaparligum ljósi, m.a. tí at hann í ov stóran mun forðar innflutningi av búnaðarvøru frá menningarlondum, men halda kortini at ES-limaskapur hevði verið eitt stórt framstig fyri íslendskar brúkarar og bøndur. Limaskapur hevði latið nýggjar marknaðir upp og við tað høvdu matvøruprísirnir lækkað munavert, eins og teir gjørdu í Svøríki og Finnlandi, tá ið hesi lond gjørdust limir í ES í 1995.

### ES: sannleikin, vegurin og framtíðin

Sum sagt er undirlagið fyri bóklinginum Javnvág og framburður/Búskaparpolitikkur við ábyrgd, tað at Ísland eigur at stevna fram ímóti ES-limaskapi og við evruni sum løggildum gjaldmiðli.

Limaskapur og evru-tøka høvdu, sambært bóklingshøvundunum, ment samhandilin við útlond, stimbra til meiri kapping, gjørt nýtsluvørur bíligari, styrkt umhvørvisverndina, styðja upp undir tøknimenning og yvirhøvur verið til bata fyri alt samfelagið og vælferðina.

Men ikki bara tað.

Fyrireikingarnar til ES-limaskap høvdu eisini, eftir teirra meting, í sjálvum sær kunnað kjølfest íslendskan búskaparpolitikk og tryggjað meiri støðugleika.